DAGSINS MEINING

Tað eru ikki ráð til longri politiska tómgongd

Veljarakanningin hjá SvF og Dimmalætting undirstrikaði gongdina, sum hevur verið, síðani fullveldissamgongan vann løgtingsvalið í 1998. Tjóðveldisflokkurin og Fólkaflokkurin, sum hevur havt og hevur Sjálvstýrisflokkin darlandi afturat sær, hava ikki breiða undirtøku millum veljararnar. Teir taptu løgtingsvalið, men teir kundu halda fram í samgongu, tí Miðflokkurin leyp upp í fullveldisleypin afturfyri at fáa ein landsstýrissess.

Í øllum veljarakanningunum, sum eru gjørdar síðani valið, hevur samgongan mist. Veljarakanningar eru ikki val, og løgmaður og hansara samgongufelagar nýtast ikki at taka avleiðingarnar av kanningum. Men tað undrar, um ikki klokkur ringja hjá løgmanni. Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum burturforklárar og sigur, at hann hevði roknað við einum uppaftur vánaligari úrsliti í kanningini, samstundis sum hann lovar, at nú fara sjálvstýrisavrikini at koma bóltandi, og tá fer veljarin at fáa eyguni upp fyri, hvussu væl tað gongur, og harvið fer stuðulin at økjast aftur.

Soleiðis skal formaðurin í Tjóðveldisflokkinum siga. Men tølini siga nakað annað. Tey boða frá, sum tað varð sagt í SvF innslagnum mánakvøldið, at stórtíðin hjá Tjóðveldisflokkinum er av á hesum sinni. Við heilt fáum undantøkum hevur hann síðani stovnanina í 1948 havt undirtøku frá umleið fimta hvørjum veljara, sum eygleiðarin vísti á í SvF, og fyrst í níti árunum var hann longri niðri enn so. Við bankamálinum og síðani fullveldiskastellunum sum lopfjøl eydnaðist tað nýggja formanninum at banka flokkin til at vera tann størsta. Nú er bankamálið gloymt, fullveldismálið er farið í bakgrundina í øllum samgongu klandrinum, og Tjóðveldisflokkurin missir støðugt.

Løgmaður er drivin politiskur taktikari, og tað er helst eingin ivi um, at hann framvegis er nógv best umtókta løgmansevnið. Sjálvt um samgongan hevur mist og missir, so have kanningarnar víst, at løgmaður hevur breiða undirtøku. Spurningurin er so, um løgmaður vil brúka undirtøkuna á annan hátt. Veljarin er troyttur av høsnagarðsfjasinum í samgonguni. Landsstýrismennirir hjá Tjóðveldisflokkinum leggja uppskot og hugsanir fram, sum Fólkaflokkurin skjýtur niður, og serliga eru tjóðveldismenninir óførir at bremsa tí, sum Fólkaflokkurin kemur við. Hetta hevur við sær, at tað er politisk tómgongd og naggatódn. Teir eru ósamdir á vinnuøkinum, sosiala økinum, skúlaøkinum og fyri stuttum sást á viðgerð í Uttanlandsnevndini, at í verjupolitikkinum er samgonga millum Sambandsflokkin, Javnaðarflokkin og Fólkaflokkin saman við Sjálvstøris klipinum, meðan Tjóðveldisflokkurin og Miðflokkurin, sum Tjóðveldið hevur givið sera sentralan leiklut, eru í andstøðu.

Veljarin hevur sæð, at tað gongur ongan veg, og løgmaður átti at tikið stig til at fingið politiska lívið á beint aftur. Tað kundi hann gjørt við at víðkað samgonguna við Javnaðarflokkinum. Hann kundi eisini sagt samstarvið við smáu flokkarnar upp, ella kundi hann skipa aðra breiða samgongu uttan Tjóðveldisflokkin. Veljarin hevur fleiri ferðir givið til kennar, at hann heldur hesa samgonguna vera turrgelda. Tað hevði verið skilagott av løgmanni, sum ivaleyst er av somu áskoðan, um hann ikki bíðaði til valskeiðið er liðugt, áðrenn hann tók stig til umskipingar. Meiri enn tvey ára politiska tómgongd afturat hevur føroyska samfelagið snøgt sagt ikki ráð til.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Ynskiligt er at uppliva meiri solidaritet í verki

Leila á Lofti

Ikki valdaði friðurin leingi í barnsburðargrunninum. Harmiligt, sera harmiligt, at tað, sum ikki einaferð, verður borðreitt við eini ætlan, ið ger støðuna verri hjá løntakarunum á privata arbeiðsmarknaðinum, og so tí lægra endanum aftrat.

Antin ein grunnur, ið javnstillar allar starvsbólkar, ella ongin.

Um onnur ætlan verður førd út í verkið, so skilji eg slettis ikki tosið um solidaritet her á landi, tá verður tað, sum eg alla tíð havi hildið, at solidaritetspílurin bara vendur ein veg ,og er tað beint í móti tí longu økonomiskt tryggjaðu elituni í Føroyum.

Eg dugi illa at ímynda mær, hvussu vit skulu koma víðari við einum barnsburðargrunni, har øll eru javnstillað, um ikki hugtakið solidaritetur verður veruleiki hjá øllum teimum,ið ongantíð koma at missa løn sum er, tí tað er teimum tryggja í avvarandi halda upp at, tí tað kann koma tann dagur, har ongin tímir at fáast við vinnuna meir, so møðsamt tað mangan er, hvar eru vit tá? tá nyttar lítið at tosað um børnini sum tilfeingi nr. 1, tí hvat hevur framtíðin at bjóða teimum í Føroyum?

Solidariteturin kann ikki bara peika ein veg, tað førir bara ónøgd og øvundsjúku við sær, tvær kenslur, ið ikki er tær mest stimbrandi, um vit ætlað okkum at økja so nógv um vinnuna her á landi, at hon verður garantur fyri einum sjálvberandi búskapi.

Eg var annars so glað, tá barnsburðargrunnurin kom, tí eg helt, at nú var hesin figgjarligi ójavnin javnaður við jørðina, í hvussu so er fyri mammurnar.

Eg sum helt, at nú var bert eftir at lata solidaritetspílin peika í móti pápunum, men, men.

Í solidariteti við pápunum, vil eg endurgeva nøkur orð úr eini danskari grein, har ein gomul omma sigur frá um sítt lív og hennara hugsan um framtíðina. Um Sjúrður Skaale skuldi fingið hug at slatra til omma, tí eg brúki hennara grein, er navnið á ommuni Henny Harald Hansen, dr. scient.soc., 90 ár, eg veit ikki hvar hon býr, men tað finnur Sjúrður útav.

Eg citeri: Men rigtig bekymret for udviklingen, det er jeg ikke. Atombomber, krig og forurening: når det virkelig gælder--op ad muren ! — så kan du tro, de finder på noget. Det har mennesket altid gjort. Og så har kvindebevægelsen gjort en glimrende ting: den har sat manden ind i barneværelset. Jeg ser sommetider fra min lejlighed nogle unge mennesker sidde ved Søerne, med ryggen til. Og jeg tænker: sikke nogle søde unge koner ! --- og så rejser de sig op og så har de fuldskæg.... Gud hvor er det pragtfuldt.

Sådan nogle fædre vil ikke fremtidigt sende deres sønner ud til kanonføde. De har hæget om dem, de har kælet med dem-de har taget ansvar for deres skæbne endnu inden de blev født — de ved de er vidne til et under. Undere slår man ikke ihjel. Min bedstefar havde tretten børn- jeg tror ikke han har været alene med eet eneste et af dem. Det nye samvær mellem far og barn er noget af det smukkeste jeg har oplevet. De vil ta` sig sammen, de vil stoppe det lort, som krige er. Så jeg tror ikke at jorden vil gå under i denne omgang. Livet er for dyrebart. Citat slut!

Tí eigur barnsburðargrunnurin hava eitt annað endamál, enn bara "at hugsa pengar ", tá barn og foreldur skulu læra hvørt annað at kenna.

Mítt ískoyti til broytingar í barnsburðargrunninum er, at fakfeløgini, sum hava barsilsløn niðurfelda í teirra sáttmála,liva upp til solidariteshugtakið fakfelagið er bygt á, og hugsa um øll tey á arbeiðsmarknaðinum, sum møguliga mugu niður í barsilsløn, fyri at tað framhaldandi skal vera nokk til útgjald hjá nøkrum fáum, sum hava sáttmálatryggjaða barsilsløn.

Meira ítøkiligt haldi eg tað vera eitt betri hugskot at geva øllum líka , til dømis kunnu tey,ið arbeiða fulla tíð, fáa kr. 14.000,00 um mánaðin, maður sum kona, arbeiðir ein hálva tíð, er gjaldið kr. 7.000,00. Í hesum tíðarskeiðinum kunnu tey háløntu so gleðast yvir at verða skattaði lægri, og seta nýtslu og útreiðslur niður tilsvarandi.

Eg ivist onga løtu í, at bankarnir eru til at tosað við um avdrøgini upp á húsalán eru ov høg, soleiðist at gjaldast kann minni ella útseta avdrøg í nakrar mánaðir.

Hvussu gott verður tað ikki tann dag grunnurin eigur ov nógvan pening? inngjaldið lækkar ella útgjaldið hækkar....

Solidaridetur í verki, ella sum handan danska omman ivaleyst hevði givið mær rætt í: Lige for lige når venskab skal holdes.

Fiskidagaskipanin í fokus

Fundir í London og Peterhead

TÍÐINDASKRIV
Fólkaflokkurin

Aftur eru boð úr útheiminum eftir Jørgen Niclasen, fyrrverandi landsstýrismanni í fiskivinnumálum at halda fyrilestur um føroysku fiskidagaskipanina. Hesa ferð eru tað bæði enska og skotska fiskivinnan, sum vilja hoyra um skipanina.

Ónøgdin við kvotuskipanir og tess ICES ráðgeving er vaksandi og vilja alt fleiri lond hoyra um alternativ. Har tykist føroyska fiskidagaskipanin at verða besta boðið.

Enska fiskivinnan skipar mikudagin 12. november fyri fundi í London, har fiskivinnan, fiskifrøðingar, politikarar og embætismenn eru bodnir.

Úr London gongur leiðin til Peterhead í Skotlandi, har skotska fiskivinnan hevur ein líknandi fund, har kvotuskipan, fiskifrøði og føroyska alternativið eru á skránni.

Fyrilesturin um fiskidagaskipanina hevur heitið "At liva við náttúruni". Á fundinum verða eisini fyrilestrar frá fiskifrøðingum, sum halda uppá ICES-útleggingina av havinum og fiskifrøðingi, sum hevur aðra fatan av havinum.

Meðan Jørgen Niclasen er burturstaddur, tekur Tummas Jacob á Løgmannsbø sæti á tingi.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstoðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásetta freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blað.

VIÐMERKINGAR

Barsilsskipanin - vorðin undanstøkking

Bjarni Djurholm
vinnumálaráðharri

Fíggjarlógaruppskotið krevur, at skipanin skal spara meira enn 20 mio kr uttan mun til hvør gjaldar hana.

Sjálvberandi búskapurin gjørdur til skammar, nú flokkar ikki vilja kenna sítt egna fíggjarlógarbarn.

Tað var altíð væntandi, at tá sparingarnar á fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 gjørdust veruleiki, so fóru flokkar at renna undan egnum avgerðum. Alt prátið um sjálvberandi búskap fór at vera gjørt til skammar, tá á á stóð, tí flokkar ikki vilja síggja fíggjarliga veruleikan í eyguni.

Í fíggjarlógaruppskotinum, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum bar í løgtingið ultimo sep-tember, stendur á síðu 200, at

"við óbroyttum grundarlagi verður barsilsskipanin mett at kosta 75 mio kr. í 2004, men verða 52,5 mio kr settar av til endamálið. Fyritreytin fyri játtanini er sostatt, at løgtingslógin um barsilsskipan verður broytt."

Hetta er greið tala: Sparast skulu 22,5 mio kr. í 2004. Tað er avtalan millum flokkarnar.

So skjótt sum umsitingin í Vinnumálaráðnum hevði fingið feskastu útreiðslutølini og spariuppskot frá Barsilsskipanini, varð tí farið undir at evna lógaruppskot, sum samsvaraði við fíggjarlógarupp-skotið.

Vanlig mannagongd

Uppskotið var á landsstýrisfundi fyri tveimum vikum síðani, haðani tað varð sent samgonguflokkunum til hoyringar. Sum vanligt, varð uppskotið hava fingið uppskotið úr Vinnumálaráðnum, hava fingið tað eftir lógini um alment innlit aftaná at uppskotið var sent til hoyringar.

Í spurninginum hvør skal gjalda barsilsskipanina, hevur undirritaði undir allari viðgerðini greitt boðað frá, at skal barsilsskipanin leggjast út til partarnar á arbeiðsmarknaðinum at gjalda og umsita, so skal hetta gerast í samráð við arbeiðsmarknaðin og ikki sum partur av fíggjarlógaruppskoti. Hetta hevur fíggjarmálaráðið fingið at vita bæði í talu og skrift, seinast í brævi 18. september 2003, tvs. áðrenn fíggjarlógaruppskotið fór til prentingar. Fólkaflokkurin hevur boðað frá somu støðu.

Hóast tað, so stendur í fíggjarlógaruppskotinum á síðu 467 undir inntøkur, at partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu fíggja barsilsskipanina. Fíggjarmálaráðið mælir eisini til at hækka inngjaldið upp í 0,4% fyri at røkka eini inntøku, sum samsvarar við útreiðslurnar uppá 52,5 mio kr. Tað vil siga, at samsvar er millum ætlaðu sparingarnar og inntøkumetingina, og at fíggjarmálaráðið tí ásannar, at sparast skal, skal setningurin náast.

Niðurstøðan er eintýdd. Fíggjarlógaruppskotið ger greitt, at skipanin skal ikki kosta meira enn 52.5 mio kr. í 2004, og at samsvarandi spariuppskot skal leggjast fyri løgtingið.

Neyðugt at spara

Tað merkir, at uttan mun til, um landskassin ella onkur annar ber kostnaðin av skipanini, so er neyðugt at gera sparingar uppá 22,5 mio kr, skal samsvar vera millum fíggjarlógaruppskotið og veruleikan.

Tað er tí spell, at ikki meira stirðil er í monnum, nú politisku mansevnini áttu at avdúka, at hóast ríkisveitingin er skorin 366 mio kr árliga, so var samgongan fór fyri at leggja lunnar undir sjálvberandi búskapin.

Nú tað rekur á kíkin falla flokkar frá. Onkur hevur nevnt at tjóðskapa sær. Kanska er tað ikki heilt av leið.

Sætta kvørnin

Kvørnin 2003 fevnir um 68 áhugaverdar blaðsíður

Aftur í ár hevur Sands Bygdarsavn staðið fyri útgávu av tíðarriti

KVØRNIN
tíðindaskriv

Søguliga tíðarritið hjá Sands Bygdarsavni, Kvørnin, er aftur komið út. Fastur táttur hevur verið, at tíðarritið kemur út einaferð um árið, og soleiðis er aftur í ár.

Í hesi útgávuni er frásøgn frá Føroyjafelag, sum varð stovnað heima á Sandi í 1871. Rannveig Winther hevur leitað mangt forvitnisligt fram um hetta felag.

Eitt annað felag, sum hevði til endamáls at styrkja um mentan og at læra fólk at vera saman í samkomu, var Ungmannafelagið Virkið heima á Sandi. Hetta felagið fyllir annars 80 ár í ár. Julianna Joensen hevur skrivað grein, sum fevnir um alla søgu felagsins.

Palli Dalsgaard hevur eisini skrivað ein grein í ritinum. Hendan er um tarabýtið í Skálavík. Tarabýtið er nú farið í søguna, men fyri mong man tað tó vera áhugavert at fáa innlit í ein part av gomlum føroyskum jarðarbrúki.

At enda hevur Ólavur Clementsen drúgva viðgerð av býlingunum í Horni, í Vørðutoft og í Skorti. Tey, ið vara av ella hava áhuga í ættarsøgu, kunnu her gleða seg um eina góða frásøgn við nógvum upplýsingum, eins og nógvar myndir eisini eru í hesum sambandi.

Kvørnin er 68 blaðsíður til støddar og kostar 70 krónur.

Ummæli:

Ljóðmúrurin

Oddfríður Marni Rasmussen

Ummæli av aðru fløguni hjá Øssuri Johannesen og Hjalta Joensen

Øssur Johannesen og Hjalti Joensen hava fyrr givið eina fløgu út. Í ár kom so onnur fløgan frá teimum báðum. Sum flestum kunnugt, er tað, Øssur Johannesen letur frá sær ikki fyri menniskju, sum ikki tola at granska seg sjálvi og finna ein ófrættaráma.

Nýggja fløgan við teimum báðum, sum bara eitur Hjalti Joensen, Øssur Johannesen 2., er heldur ikki fyri menniskju við vinglandi andaligum gongulagi. Bassspælið hjá Øssuri, er nú eitt tað skitnasta, sum finst, í hvussu so er her um leiðir. Ikki ein tóni, sum bassurin letur, er reinur, ella vanligur skuldi eg heldur sagt. Um ikki ljóðið er avskeplað, antin við einari fløsku ella einum knívi (hetta er vorðið nærum eitt eyðkenni hjá Øssuri), so verða ymiskar effektir brúktar.

Øssur er ongin tekniskur bassleikari. Men tað, sum hann er førur fyri og sum aðrir, ella fáir ikki megna er, at lata ljóðið úr bassinum í ein búna, ið ikki er til at kenna aftur. Hesin búnin er merktur av einum intensiviteti, ið ikki er úr hesum heimi. Til tíðir yvast tú, um tað er Øssur ella Hjalti, sum spælir. Hetta kann tykjast, sum um teir herma eftir hvørjum øðrum, men eg haldi ikki at tað eydnast væl, tí ljóðið frá bassinum og ljóðið frá gittarinum líkjast ov nógv.

Tónleikurin á fløguni er ein ljóðmynd, ella kanska bara ein múrur ímillum ljóð og óljóð. Og sum so virkar hetta væl, men tá ið ilt er at skilja mun á gittar(ó)ljóði og bass(ó)ljóði, verður tað onki serliga spennandi. Tað sum har aftur ímóti er spennandi, er tá ið eitt atmosferiskt rúm spakuliga verður bygt upp, har Hjalti við sínum melankolska spæli, roynir at svara aftur teimum hóttandi endurtøkunum frá Øssuri, sum til dømis í skering 6.

Fløgan er improviserað. Ikki nógv er tilætlað spæl. Og tað skal tað jú eisini vera. Tá ið tónleikurin er bestur, sær tú tónarnar lesa seg upp eftir tínum egnu nervatrædrum, og tað er jú ikki so lítið. Í øllum hesum meldrinum av ljóðum og óljóðum, fær tú ikki latið vera við at hugsa, hvussu gott tað er, at onkur ger inniligan tónleik - tónleik, sum meinar okkurt - tónleik, ið rakar mergin. Hvørki Øssur ella Hjalti eru bangnir fyri at spæla sín egna merg út millum ryggjageislarnar, og tað merkir upplivingina av tónleikinum. Nú nevni eg uppliving. Tónleikurin skal ikki skiljast hann skal upplivast, og fyri at nøkur munagóð uppliving skal spyrjast burtur úr, má hugsast. Tankarnir koma av sær sjálvum. Teir fylgja spælinum og (ó)ljóðunum.

Sum vera mann, hevur Øssur Johannesen sjálvur teknað kápumynd. hann er jú ein av teimum fáu menniskjum, sum duga at fáast við fleiri ymisk listasløg. Tað er Tutl, sum hevur givið fløguna út. Góða eydnu við tí triðju fløguni.

Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo